## DAGSINS MEINING

# Trúvirði ein trupulleiki

Hernaðarsamgongan, sum herfyri leyp á Iraq, er komin í trupulleikar bæði á ein og annan hátt. Hernaðarliga tykist steðgur at vera komin í sjálva herferðina m.a. tí at mótstøðan er nógv størri enn roknað var við frammanundan. Ein týðandi fortreyt hjá teimum sameindu fyri avgerðini um at herja á, var, at roknað varð við einum fólkauppreistri móti stjórnini í Iraq, tá álopið byrjaði og herurin hjá teimum sameindu tók seg inn í Iraq. Henda fortreyt bygdi á, at politiska leiðslan í USA var sannførd um, at Saddam Hussein er so illa dámdur, at ein uppreistur mátti koma so at siga av sær sjálvum.

Men nú hevur kríggið vart meira enn eina viku og enn røkist einki fyri nøkrum uppreistri millum iraqar móti einaræðinum hjá Baath-flokkinum og Saddam Hussein. Einastu tekin um mótstøðu er millum kurdar norðantil í Iraq, men hetta telur líkasum ikki við, tí Saddam hevur onga hermegi í kurdiska partinum fyri norðan. Hetta, at eingin uppreistur bleiv, er einki minni enn ein vanlukka fyri bretsku og amerikonsku herferðina inn í Iraq. Vandi er nú fyri, at herferðin steðgar upp og at kríggið av álvara kemur í drag. Støðan kann skjótt fara at gerast lík henni, sum Rusland er komið í í Tjetjenia.

I USA og Bretlandi mugu politisku og hernaðarligu leiðslurnar nú spyrja seg sjálvar hvørjar orsøkirnar eru til, at eingin uppreistur móti Saddam Hussein gjørdist veruleiki. Svarið er ikki so líkatil. Eitt er so vist: tað er ikki tí, at Saddam og hansara harðrendi Baathflokkur eru avhildin av iraqiska fólkinum. Heldur er tað´at finna í fyrra Golfkrígnum. Tá eggjaði táverandi forsetin Bush (eldri) fólkinum í sunnara parti av Iraq at gera uppreistur móti einaræðinum í Bagdad. Afturfyri lovaði hann teimum fullan stuðul til at fella Saddam og at til at skipa sunnara partin av Iraq sum eitt sjálvstýrandi øki. Tey tóku Bush eldra uppá orðið og gjørdu uppreistur. Hesin uppreistur gjørdist ein vanlukka fyri fólkið har suðuri í Iraq, tí Bush eldri sum kunnugt sveik lyfti sítt. Hann tók amerikansku hermegina út úr Iraq, og Saddam hevndi seg á ræðuligan hátt inn á fólkið, sum hevði gjørt uppreistur eftir áheitan frá Bush. Fólk í hundratúsundtali vórðu dripin, og land teirra lagt í oyði við at alt vatn varð veitt burtur. Tað er sostatt einki løgið í, at iraqar nú ikki gera uppreistur. Teir eru ov illa royndir av fyrra Golfkrígnum og líta heilt einfalt ikki USA. Hetta er ein veruleiki, sum strategarnir í Pentagon áttu at hugsað um, tá teir løgdu sínr ætlanir.

Sosialurin kann annars í dag kunngera eina kanning, sum Gallup í Føroyum hevur gjørt fyri blaðið um kríggið í Irak. Úrslitið av kanningini vísir, at helvtin av teimum spurdu halda tað var rætt av USA at leypa á, meðan minni enn 40% halda, at hetta var skeivt. Samtíðis halda helvtin av teimum spurdu eisini, at málið átti at verið handfarið í ST h øpi. Kanningin er á síðu 4 og 5 í blaðnum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

Vilhelm Johannesen, løgtingsmaður, um Leirvíksfjarðarleiðina:

# Samgonguumboðini hava sjálvi skapt trupulleikan



**Tá uppskotið til fíggjarlóg fyri 2003 var til 2. og 3. viðgerð á tingi, samtyktu samgonguumboðini í løgtinginum, eisini umboðini úr Norðoyggjum, at lækka játtanina til strandferðsluna við 7,5 mió. kr.**

Í løtuni valdar sannur ruðuleiki viðvíkjandi siglingini um Leirvíksfjørð. Bilrøðirnar, sum bíða eftir at verða fluttar um fjørðin, eru við hvørt meira enn 100 metrar langar.

Fólk sita ótolin og bíða eftir, at tey skulu sleppa umborð á Dúgvuna ella Sam, og meðan bíða verður, fáa leiðarin á strandferðsluni, Kristian Davidsen og leiðarin á ferðafólkadeildini, Poul Jacob Thomsen, mong ókvæmisorð yvir sín kropp. Men teir seku – teir, ið veruliga hava ábyrgdina av hesum óskili, sleppa undan, og geva fólki vøkur lyfti um, at teir skulu fáa enda á tí óskili, sum teir sjálvir hava skapt.

Millum teir seku, eru norðoyatingmenninir Jógvan við Keldu, Heini O. Heinesen og Jákup Mikkelsen. Tá uppskotið til fíggjarlóg fyri 2003 varð viðgjørt í fíggjarnevndini, skuldi meirilutin (samgonguumboðini), finna sparingar fyri umleið 90 mió. kr. Partur-in hjá strandferðsluni varð 7,5 mió. kr. T. v. s. at strandferðslan fekk 7,5 mió. kr. minni, enn biðið varð um, fyri at nøkta tørvin á sigling, m.a. um Leirvíksfjørð. Millum teirra, sum skerdu hesa játtan, vóru Jógvan við Keldu, Heini O. Heinesen og Jákup Mikkelsen.

Avleiðingin, ið stóðst av hesi skerjing í játtanini til strandferðsluna, var, at ferðaseðlaprísirnir hækkaðu, at siglingin á Vág varð niðurløgd, at siglingin inn á Skálafjørðin varð niðurløgd og at ráð ikki eru til ein nøktandi flutning um Leirvíksfjørð. Tað er sera kostnaðarmikið fyri vinnulívið í Norðoyggjum, at bilar við ráfiski og bilar við fiskaútflutningi, skulu standa í tímavís og bíða eftir at sleppa um fjørðin. Hetta er eisini ein trupul støða fyri øll tey, sum vanliga ferðast um Leirvíksfjørð, antin til arbeiðis, í skúla ella í øðrum ørindum.

Undirritaði, sum er limur í løgtingsins fíggjarnevnd, tók als ikki undir við, at játtanin til strandferðsluna varð skerd. Saman við umboðunum fyri sambandsflokkin mælti eg til ymiskar sparingar á fíggjarlógini. M.a. mæltu vit til at spara umleið 20 mió. kr. í almennu umsitingini. Vit mæltu til at leggja oljumálaráðið saman við vinnumálaráðnum. Eisini mæltu vit til at leggja heilsumálaráðið saman við almannmálaaráðnum. Og somuleiðis mæltu vit til at leggja løgmálaráðið saman við løgmansfyrisitingini. Á hendan hátt kundu vit spart tríggjar landsstýrismenn og trý aðalmálaráð burtur.

Men tað vildu samgonguumboðini ikki. Jógvan við Keldu, Heini O. Heinesen og Jákup Mikkelsen, saman við restini av samgonguni, vildu heldur hevna seg inn á siglingina um Leirvíksfjørð. Tað gjørdu teir við at skerja játtanina til strandferðsluna við 7,5 mió. kr. Harvið hækkaðu teir eisini ferðaseðlaprísin hjá útoyggjafólki og øllum teimum, sum skulu ferðast um Suðuroyarfjørð, Skopunarfjørð og Leirvíksfjørð. Teir løgdu stein oman á byrðu, bæði hjá vinnulívinum í útjaðaranum, og hjá øllum teimum, sum hava valt at búleikast har.

Tá tað snýr seg um at játta pening til almennu umsitingina í Havn er onki óført. Eftir fimm árum er talið av aðalmálaráðum hækkað úr seks upp í nýggju. Í sama tíðarskeiði er játtanin til aðalmálaráðini hækkað úr 53,8 mió. kr. uppí 137,9 mió. kr. Ein hækking á 84,1 mió. kr. eftir fimm árum. Talið av fulltíðarstørvum í landsumsitingini økist við rúkandi ferð og er nú komið upp á 330 heiltíðarstørv. Samstundis verður játtanin til strandferðsluna og til siglingina um Leirvíksfjørð skerd tí vit skulu spara. Hvar er logikkurin og hvar eru tey gyltu vallyftini hjá Jógvani við Keldu, Heina O. Heinesen og Jákupi Mikkelsen ?

Framtíðarloysnin er sjálvandi fast samband um Leirvíksfjørð við einum undirsjóvar-tunnli. Men vit eiga at síggja í eyguni, at hesin gerst ikki veruleiki fyrr enn í 2006, og spurningurin er so, hvussu vit kunnu nøkta flutningstørvin um fjørðin hesi trý árini. Við verandi ferðaætlan og verandi játtan á fíggjarlógini kunnu Dúgvan og Sam ikki nøkta henda tørv. Fyri umleið tveimum árum síðani, fingu vit at vita frá landsstýrismanninum í vinnumálum, at strandferðslan kundi fáa eitt skip til keyps, sum var millum fimm og 10 ára gamalt. Keypsprísurin var millum 25 og 30 mió. kr. Og til støddar var skipið ímillum Ternuna og Dúgvuna.

Hetta vildi verið eitt hóskandi skip at røkt Leirvíksfjarðarleiðini saman við Dúgvuni. Undirritaði sett beinanvegin fram uppskot um at játta strandferðsluni 30 mió. kr. til keypa av hesum skipi. Hetta varð gjørt við broytingaruppskoti til eina eykajáttanarlóg, sum varð viðgjørd í fíggjarnevndini tá, men uppskotið vann ikki frama. Seinni havi eg endurtikið sama uppskotið, men við sama vánaliga úrslitið, tí samgongan vildi ikki játta tann neyðuga peningin, heldur ikki norðoyatingmenninir í samgonguni, Jógvan við Keldu, Heini O. Heinesen og Jákup Mikkelsen. Men tá tað snýr seg um at játta stórar upphæddir til aðalmálaráðini í Havn eru "ingen smalle steder".

Tað ljóðar heilt ótrúligt, tá vit nú hoyra fjølmiðlarnir bera tíðindi um, at norðoyatingmenninir arbeiða við at loysa trupulleikan, sum valdar á Leirvíksfjarðarleiðini. Hetta eru júst somu tingmenn, sum hava skapt henda trupulleika, við at skerja játtanina til strandferðsluna við 7,5 mió. kr. Undirritaði hevur ongi arbeiðsboð fingið. Men eg var heldur ikki við, tá játtanin til strandferðsluna varð skerd; teir, ið stóðu aftan fyri skerjingina, vóru m. a. Jógvan við Keldu, Heini O. Heinesen og Jákup Mikkelsen.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Brot úr brævi (II)

**Heri Mohr**



"…. Tolin trívst, plaga vit at taka til, tá ið eitthvørt dregur út, ella okkara tol av avísumorsøkum skal standa sína roynd. Um nakrar dagar hevur tú verið har á sjúkrahúsinum í tveir mánaðar, og hóast bæði tú og eg og børnini eru við góðum toli, so er saknurin stórur, og stundum kennast dagarnir so tómir. Eg haldi, at lítli beiggi so smátt er givin við at spyrja: nær kemur babba heim? – Men í tínum seinasta brævi, sum eg fekk í gjár, ert tú lættur og bjartskygdur, tí yvirlæknin við serkunnleika í tínari sjúku hevur uggað teg við, at tín sálarstyrki, títt góða sinnalag og dugnalig sjúkrahúshjálp gera sítt til, at tú um nakrar vikur aftur er heima saman við okkum, og at tú um einar 2 til 3 mánaðar leggur frá landi at troyta mið og grunnar, sum er títt hálva lív.

Um eg hevði torað at flogið, vildi eg komið niður til tín beinanvegin, men sum tú veist, so eri eg so býttislig ikki at hava álit á flúgvingini, av tí at útbyggingin av flogvøllinum, sum skuldi verið gjørd fyri fleiri árum síðan, ikki er gjørd, og tólini til endamálið hava ligið øll hesi árini óútpakkað í onkum pakkhúsi, og mær er fortalt, at einki fer at verða útbygt ella gjørt við flogtrygdina, tí at loysingarmenn ella teirra politikkur er orsøkin til óskilið. Hvat fara teir at siga – Hann straffi mín munn – tann dagin ólukkan er hend. Mær er fortalt, at meira enn 100.000 fólk ferðast um flogvøllin um árið. Tað var ikki meira enn sjálvsagt, at landsstýrismaðurin við flogferðslu um hendi greiddi okkum frá hesum álvarsmáli. Og álvaratos góði Jógvan, eg vildi ikki verið hann. Eg havi í dag bílagt mær pláss við nýggju "Norrønu" um einar 3 vikur, tí tá koma eg og lítli beiggi niður at vitja teg, og vit verða saman við tær í eina heila viku. Eg gleði meg ómetaligt.

Tíðin fellur mær long serliga náttin, tí svøvngávurnar eru ikki so góðar, sum tær hava verið. Men hetta hevur tó tann fyrimun, at tá friður er undir lonini,, og alt arbeiðið er fingið frá hondum, kann eg sita ofta út á náttina og lesa. Allar tínar bøkur, sum eg í mong ár ikki havi haft stundir at lesa, eri eg so smátt farin at blaða í. Í løtuni lesi eg tann russaran, sum tær dámar so væl, og hóast hann er tungur og krevur umhugsan, so gerast torskildu orðini so livandi og sonn. Hann skrivar einastaðni nakað soleiðis, (tú hevur óivað lisið bókina fyri langt síðani, og tær líkt hevur tú kanska lisið hana meira enn einaferð):

"Okkara samfelagspolitikkur manglar haldgóð fundamentir, sum eru neyðug til andaligan og handaligan tryggleika, ið gevur mannsømiliga tilveru hjá øllum, sum í hesum landi búgva. Okkum tørvar aðrar tónar og onnur orð, ikki um nýggjar samfelagsteoriir, ideologiir og trúfrøði men orð og tónar, sum avdúka stirðnaðar og óektaðar religiøsar trúarlærur og allar ideologiir sum ivasamar. Hesi nýggju orð og tónar koma ikki ítøkiliga til sjóndar, tey verða ikki søgd beinleiðis, men gera vart við seg sum ósagdir pástandir um, at uttan at sýna hvør øðrum virðing verður lívið marra og líðing við øvund, illgitingum, hat og girnd."

Bert 40 ár eftir at bókin, sum eg siti og lesi, kom út, varð Russland díkt undir og fólkið niðurbundið av eini fanatiskari rørslu við støði í nationalismu, sum í 70 ár kostaði ótaldar milliónir av fólkum lívið.

Góði Jákup, eg eri so býtt, men hvussu heldur tú, tað fer at síggja út í Føroyum um nøkur ár. Vit hava nú í longri tíð hoyrt endaleyst tos um framburð og frælsi, um sjálvberandi búskap, um og-so-víðari-patentloysnir og mannminkandi tiradir um danska olmussu til sjúk, gomul, avlamin og ung lesandi. Er hesin orðvavstur og hendan eyðmýking av flest øllum føroyskum heimum støðið. ið vit og okkara børn skulu byggja á? Hetta ger meg í ørviti og ótrygga, tí um er tað so galið, sum hesir fólkavaldu pota í okkum dag og dagliga, og her hugsi eg serliga um sjúkrahjálpina til tín á sjúkrahúsi í Keypmannahavn og til lesturin hjá Jákupi á universitetinum í Aarhus, at vit fáa olmussuhjálp úr Danmark, so er tað betri at bæði tú og sonurin koma heim sum skjótast. Vit kunnu so trálesa bókina hjá Eiðis lækna um gomul føroysk heimaráð, og kanska har finna tíni sjúkaeyðkenni og soleiðis fáa heilsubót. Jákup má so fáa sær eitt og hvørt arbeiði at liva av, tí tann útbúgvingin, sum hann ætlaði sær at fáa í Aarhus, ikki fæst í Føroyum. Ja, Jógvan, nú fór blóðtrýstið í so høgt upp.

Tað gongst væl við lesingini hjá lítla beiggja. Nú ein dagin sat hann so hugagóður og stavaði seg ígjøgnum ævintýrið hjá H. C. Andersen, "Nýggi búni keisarans". Eg kom tá at hugsa um okkara oljumálaráð við ráðharra, embætisfólkum og starvsfólkum, sum í 5 ár hava arbeitt við ongari olju. Hetta átti at komið í Guinnessbókina. Men kanska fara øll hesi fólk ein skjønnan dag at hoyra eitt lítið barn siga: "Pápi, ráðharrin er nakin"? Og Harrin viti, hvussu nógvar 100-tals milliónir tað hevur kostað okkum skattaborgarum at spæla oljusjeikadømi.

Í einum av mínum brøvum fortaldi eg tær um løgtingsmann, sum er av teirri áskoðan, at ein kiosk átti sín leiklut, tá ð skriðibakkin leyp, og vit øll endaðu á blámanum orsakað av løgtingslógum við ongari umsiting og umsiting við ongum løgtingslógum. Nú er hesin sami maðurin aftur í bløðunum íblástur við politiskari skizofreni og paranoia. Eg sendi tær sum avtalað bløðini hvønn leygardag, so kanst tú sjálvur lesa greinina.

Eitt kvøldið hevði lítli beiggi og 3 aðrir smádreingir verið á seiðabergi á Skarvhellu, og teir komu aftur við 22 stórum seiðum, tveimum berggyltum og einum stórum reyðfiski, tað var ikki meira enn, at teir knógvaðu fongin til hús. Hetta kvøldið fingu vit stoktan seið, breyð og seiðalivur. Ja, nú rennur úr tonnunum, kann eg ætla.

Góði Jógvan, nú er songartíð, farið er um miðunátt, og ikki mugu vit falla í fátt, tí nú er niðurteljingin, tá ið farið verður umborð á nýggju Norrønu "bound for" Ríkishospitalið, byrjað.

Eg gleði meg!!"

Kærar heilsur frá
**okkum 5, kona tín**

# Eg, marran, ÚF, Norrøna og Havnin!

**Hallur Hjalgrímsson**



Ikki er tað ofta, at eg komi úr songini á morgni, fái mær kaffi, seti meg at lurta eftir Útvarpi Føroya, og síðani fái marruna. Vanligt er jú, at um man fær marruna, ja so er tað sum oftast áðrenn man fer úr songini. Men Mikumorgunin 26.03. var tað altso øvugt.

Eg sat framman fyri telduni kannaði postin og annars bara nýtti friðin. Morgunsendingin var í luftuni og alt var gott. Nú er tað so, at morgunsendingin hevur tað við at enda. Tað skal hon jú, tí ikki hevði tað verið stuttligt at hoyrt morgunsendingina allan dagin. Men hendan morgunin hevði tað nokk verið best, í øllum førum fyri meg, um hon ikki endaði.

**Útvarpsmaðurin segði:** Klokkan er 3 minuttir yvir 9 og nú kemur sendingin "**Føroyar í dag**", Sigmar Bláberg leggur til ættis.

**HURRA! Norrøna kemur! c",)**

Lat meg siga alt fyri eitt, at tað ikki var "Føroyar í dag", ið nakað var galið við, men tað var innihaldið, ið gav mær kaldasveitta.

Norrøna kemur! Øll eru so glað, spent, rørd og ikki minst stolt. Alt gott um tað, men eg fekk marruna, kaldasveitta, og ikki at gloyma, eg setti kaffi í hálsin.

Innihaldið í sendingini hendan morgunin, var um tað ferðslukaos, ið fer at standast av, at nýggja Norrøna um stutta tíð fer í fasta sigling.

Eg havi sagt fyrr, at ferðsluruðuleikin longu nú er veruleiki. Og tað sær ikki út til, at støðan fer at batna, tá ið "**ferjan mikla**" kemur á Havnina fyrstu ferð, nú 10´inda í næsta mánaði. Og eg má siga, at útlitini eru ræðandi. Fólk vóru beinleiðis rádd til at halda seg burtur frá keiøkinum, ímeðan Norrøna var í nánd. Hvat er tað fyri nakað? Er tað veruliga meiningin, at vanlig fólk ikki kunnu nærkast keiini, tá ið Norrøna liggur har?

**Politiið veit heldur ikki síni livandi ráð!**

Tosað varð við fleiri fólk, ið á ymiskan hátt skuldu syrgja fyri, at ferðslan skuldi ganga so væl sum gjørligt. Har varð greitt frá, at teir, ið stóðu fyri arbeiðinum at út byggja Tórshavnar havn, soleiðis at Norrøna kundi leggja at, bert tóku hædd fyri tí ferðsluruðuleika, ið vildi taka seg upp niðri á Eystaru bryggju, sum um at tað hjálpir nakað uppá ferðsluna í restini av býnum.

Ein var tó, ið veruliga lýsti støðuna soleiðis sum hon er. Jón Klein Olsen, vara politiinspektørur. Hann segði beinrakið, at trupulleikin ikki bara verður niðri á Eystaru bryggju, har Norrøna skal leggja at, men eisini aðrastaðni í býnum. Hann vísti á, at politiið hevur sæð tær kanningar og metingar, ið gjørdar eru í sambandi við útbyggingina av havnalagnum, og um eg skilti tað rætt, so eru hesar kanningar ikki rættuliga nakað, ið politiið kann brúka. Tí um teir skulu kunna fyrireika seg best møguligt, so er neyðugt við einari heildarmynd av ferðsluni í øllum býnum.

**Telefonsvararin hjá Smyril line!**

Eg má siga at, eg ikki fekk navnið á talsmanninum hjá Smyril line við, men tá ið hann bleiv spurdur, um Smyril line hevði tikið hædd fyri tí ruðuleika, ið fór at vera um allan býin, hvørja ferð í Norrøna legði at bryggju í Havn, fekk eg ta fatan, at tað høvdu teir ikki. Tó so, Smyril line vildi vera við til at hjálpa alt tað, ið teir kundu. Hann greiddi frá, at Smyril line fór at byrja eina tænastu, har fólk kundu ringja inn til ein tlf-svarara og har fáa kunning um, nær Norrøna væntandi var á Havnini og nær hon fór avstað aftur.

Eg vil við hesum "takka" Smyril line fyri teirra vælvilja, men álvara tos, meina tit veruliga, at hatta er loysnin? Eg meini so í øllum førum ikki, at tað er. Hatta er eftir mínari metan at leggja stein omaná byrðu. Tí at tað, sum Smyril line leggur upp til, er, at Havna borgarar, hvørja einastu ferð teir skulu út um dyrnar, skulu ringja til telefonsvararan hjá Smyril line, fyri at kunna seg, um tað man vera ráðiligt at seta seg í bilin ella um best man vera at bíða til Norrøna er farin. Hvat tramin er meiningin? Skulu vit,sum búgva í Havn, nú vera slavir hjá einum telefonsvarara hjá Smyril line? Nei tit, um tit vilja hjálpa, so flyta tit atløgubryggjuna á eitt annað og meira hóskandi pláss! Eg veit ikki, hvussu tað er við deplinum hjá Hans Mortensen inni á Sundi, men tað er so eitt boð.

Hvussu er og ikki, so er tað heilt ótrúliga løgið, at ikki fleiri lata við seg koma.

**Spreingja Tinganes?**

Røddir hava nú guð hjálpi mær eisini verið frammi um, at nesið, sum allir rættir havnarborgarar eru so stoltir av, skal spreingjast burtur, so at betur pláss verður hjá vinnulívinum at búleikast á Eystaruvág. Hvat sørin er galið við fólki? Tit, ið bara hava givið hesum tanka eitt lítið pláss í tykkara huga .... skamm fáið tykkum. Eg eri vísur í, at verður Nesið sprongt burtur, ja so er tað ikki bara Nesið, ið fer í luftina, men eg kann hugsa mær,at tað vera eisini meira enn ein borgari í Havnini, ið ger tað sama.

**Hvat við einum borgarafelag?**

Sjálvur haldi eg, at tíðin er komin til, at vit borgarar í Havn taka okkum saman í eitt felag. Tí at tað er heilt greitt, at vit verða ongantíð spurd um nakað sum helst. Heldur vera vit sperd.

Lat okkum taka tvey dømi: Tá ið Strendur og Runavíkin løgdu saman, vórðu borgararnir í báðum kommunum spurdir, við eini fólkaatkvøðu. Men tá ið Havnin og Kollafjørður skuldu leggja saman, ja so vóru tað bara fólk í Kollafirði, ið vórðu spurd. Ikki tí, eg havi einki ímóti samanlegging, men hví vórðu vit í Havn ikki spurd?

Latið okkum tí við einum felag taka okkum saman fyri at verja okkara Havn, ímóti gribbunum, ið vilja køva hana.